LM-096/2022

LØGTINGIÐ

Fíggjarnevndin

Løgtingsformaðurin

**14. apríl 2023**
**hm/ód**

**Leingjan av freist til framløgu av áliti í teimum málum, sum eru í Fíggjarnevndini**

Í marsmánaði vóru 10 fundir í Fíggjarnevndini, har ið nevndin viðgjørdi uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2023 umframt m.a. tríggjar verklagslógir, sum álit vórðu løgd fram í. Eftir páskir hevur nevndin havt ein fund, har viðgerðin av teimum málum, sum eru í nevnd, varð løgd til rættis. Nevndin væntar at verða komin á mál við hoyringum í øllum málunum í endanum av viku 17.

Nevndarformaðurin fer tí at heita á løgtingsformannin um at leingja freistina sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini viðvíkjandi teimum málum, sum eru í Fíggjarnevndini, til mánadagin 8. mai 2023.

Málini, ið talan er um, eru hesi:

**Løgtingsmál nr. 57/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin)** (Keyp av egnum partabrøvum, dagføringar av stovnsheitum, herdar revsireglur og málsligar nágreiningar o.a.)
Málið var til 1. viðgerð 15. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 58/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin)** (Broyting av skuldarmarki)
Málið var til 1. viðgerð 15. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 59/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)** (Longd freist fyri at fáa endurrindað meirvirðisgjald av íløgum í almannagagnligt frítíðarvirksemi)
Málið var til 1. viðgerð 15. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 60/2022: Uppskot til løgtingslóg um almennu talgildu postskipanina Mínboks**
Málið var til 1. viðgerð 20. mars 2023.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

**Løgtingsmál nr. 61/2022: Uppskot til løgtingslóg um talgilda samleikakortið**
Málið var til 1. viðgerð 20. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 63/2022: Uppskot til løgtingslóg um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15 í Tórshavn**
Málið var til 1. viðgerð 20. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 66/2022: Uppskot til løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum**
Málið var til 1. viðgerð 22. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 72/2022: Uppskot til samtyktar um tvískattaavtalur**
Málið var til 1. viðgerð 9. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 76/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)** (Øktur barnafrádráttur)
Málið var til 1. viðgerð 20. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 78/2022: Uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2021**
Málið var til 1. viðgerð 9. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 82/2022: Uppskot til samtyktar um at taka av oljuavgjaldið**
Málið var til 1. viðgerð 22. mars 2023.

**Løgtingsmál nr. 96/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)** (Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)
Málið var til 1. viðgerð 31. mars 2023.

Vegna nevndarformannin
Hallur Markná
nevndarskrivari